reportasjurøð | Lívið á Landssjúkrahúsinum

# Oh, Lawd, I'm on My Way!

**TÓNAVERKIR. Í eini yvirflóð av undirtónum innan úr útvarpinum varð eg født í dag. Við diskin í lívsins Seven-Eleven-kiosk stendur ljósmóðurin, Samson. Og mamma er eisini krútsterk. Fáorðaði faðir beinir alla innlivingina út í armarnar og eyguni. Ein grøntklæddur tíðindamaður við pressikorti er mín frælsi talsmaður og tulkari**

## Reportasja



Høgni Mohr

*»Eg eri eygu, oyru, nøs og muður pinkubarnsins.«*

*Høgna opinbering, einasta ørindi*

Klokkan, sum hongur beint inni á føðistovu 1, gongur skeivt. Tað hevur hon gjørt í 24 ár. Mamma mín skal setast í gongd. Hon hevur gingið 14 dagar yvir tíðina. Ljósmóðurin eitur Samson. Hon kemur at prika hol á hinnuna, so fosturvatnið fer.

Tá ið konur teirra áttu, smullu bæði ein royndur tannlækni og ein sterkur fótbóltsspælari í gólvið, minnist onkur. Babba er hvørki tannlækni ella fótbóltsspælari; tíansheldur svímaður. Babba er bara spentur sum eitt barn. Eingin eitur sum babba, og eingin er sum babba. Hann er útróðrarmaður í stálbáti. Á, babba! Tú sært so fittur út í svørtum klæðum og skóm.

Nú er klokkan ordiligt 10.02. Mamma stendur úti í longu gongini og bíðar eftir verkjum. Har renna gongsgentur, og har standa summar konur uppsteðgaðar, tí gongulagið er í ólagi. Ein hurð er neyðútgongd. Man mær tørva eina slíka í dag? Á bróstunum hongur nógv danskt um bróst, bilbelti og annað spennandi. Fólkini í hvítum klæðum eru ikki líka glað, sum tey hava verið. Her er stilt eftir stríð. Men konan Samson mannar seg upp.

– Eg hopi ikki, at tú skrivar, at ljósmóðurin hevur mist pappírini vekk, sigur hon flennandi við grøna mannin, meðan hon leitar eftir pappírsrúgvuni um meg og mammu.

Nú eru vit inni á føðistovu 1. Tað er gongd í, merkir Samson. Babba kennir, at húðin á hondini á mammu er heit og vát. Hann hoyrir hjarta mítt duka, og í nasum hansara kennist eitt angabland millum sprittaðar hendur inni og tey trý rossini uttanfyri, sum sova eitt sindur, eta meiri og skíta á rest.

Mamma gongur og válar einsamøll, meðan Elvis í útvarpinum syngur: *You´ll never walk alone.* Onkur tekur Elvis í álvara. Tað er ein vespa á einum veggi, sum ger ein vørr. Bjølgurin, sum eg liggi í, darrar, tá ið vespan av vegginum surrar svøk rundan um mammu. Babba táttar takið í leðurhondtaskuni hjá mammu. Hann hevur hug at loypa til, har ið hann situr í stovustólinum. Men so kemur hjálparfólkið Inga inn at hjálpa. Hon sproytar spritt mitt á vespuna. Vespan stingur í sekkin og fer út gjøgnum gloppaða gluggan.

### Beethoven og babba

Fýra sløktir ljósbakkar hanga undan loftinum í rúminum, sum er føðistova, vanlig stova og baðirúm í senn. Sólin stendur beint inn í rútarnar. Babba mutlar fyri seg sjálvan. Hann er heitur.

– Meðan vit bíða! Huff ...

Mamma tivar eitt sindur og hvílir seg niður á vestara gluggakarm.

– Vilt tú sita, spyr babba, ið ikki eigur annað enn eyðmýkt í eygunum.

– Nei, eg orki ikki at sita, svarar mamma fjaroygd.

– Noy, lítið voyggj er í vespunum, sigur babba og letur eitt annað vindeyga upp. Eitt frískligt lot trokar seg inn.

Ljósmóðurin kemur við einum grønum hitadunki. Hon leggur hann at verma kláru vøgguna, sum eg skal liggja í.

– Harðnar tað ordiliga nú, Anita, spyr hon.

Mamma er ikki rættiliga við longur. Hon hellir seg inn at fótalagnum á Sechersborðinum. Har stendur hon og stunar stillisliga. Úr lítla, gráa Philips-tólinum á hillini ljóma nú kamartónar frá Rossini.

– Hetta er ikki allarbest, sigur mamma, sum hermir eftir mær og leggur seg í fosturlegu í seingini. Babba situr hond upp undir kinn og bítur í síðuna á longutong. Hann hyggur, meðan Samson spennir eitt lurtibelti upp á mammu og smyr ultraljóðsalvu upp á búkin. Hjarta mítt dukar enn sum áður.

– Vilt tú hava kodda, spyr Samson.

– Tað hevði ikki verið so galið, svarar mamma.

– Skalt tú massera, Jónhallur? Gníggja lendarnar eitt sindur, spyr Samson babba.

Babba nikkar og fer at mýkja mammu um breiðu lendarnar, meðan hann hyggur út á stálboyuna uttan fyri Álaker. Babba hevur útróðrararm við eini kanadiskar ørn á. Í útvarpinum letur Ove Olsen Trio Fontenay spæla fyrsta sats í klavertrio nummar fimm í D-dur eftir Beethoven. Men við seingina er babba dirigentur. Hjá honum er barnahjartaljóðið taktin og mýkjandi tummilin taktstokkurin. Soleiðis stjórnar ein útrættur útróðrararmur mammu, tá ið hon fær fyrsta satsin av tónaverkjum.

– Á, á, hau, hau, á ...

Tá ið so Trio Fontenay fjarar burtur saman við verkjunum, loysir New York Philharmonic Orchestra av við Porgy og Bess-løgum. Nøtrandi sopranin, Roberta Alexander, gera alt púra greitt við orðunum: *Oh, Lawd, I'm on My Way!*

### Cher up!

Lokal tíð í lokalinum er nú 10.50 (tað er okkurt um 11.33 í gongini!).

Mamma hongur um herðarnar á babba, sum stúrin kínir henni um ryggin. Babba bítur seg í fremstafingur, meðan Mischa Maisky letur Ave Mariu eftir Franz Schubert súga úr síni sello. Løtu seinni eymkar mamma seg saman við fiólini hjá Lailu Josefowitch, sum spælir Zigeunerweisen hjá Pablo de Sarasate. Mamma og Samson brosa hvør til aðra:

– Lat okkum fáa tað yvirstaðið, sigur mamma.

– Ja, nú plagar at vera skjótt, svarar Samson.

Mamma eymkar seg inniligt, meðan hon hongur um hálsin á babba. Nú ljóma døgurðatónarnir hjá gamla enska beatbólkinum, Hollies: *He aint heavy, he is my brother.* Ha! Lítið vita tit; eg eri bæði tung og systir!

Babba fer eftir meiri vatni, og Samson lurtar eftir lítla hjartanum. Mamma drekkur og heingir seg aftur niður á sterka borðið, ið veik pinkubørn verða viðgjørd á. Babba skriðar sær í nøsini og stillar seg hendur í hupp. Hann er sum Martin Luther, ið stóð og ikki kundi annað. Hetta er eitt spenningsfult spæl millum burturkveistran og sameining. Babba hyggur í bakið á mammu, sum er fjaroygd og pínist illa. So mannar hann seg upp og gongur fram at henni sum ein langtandi edilingur. Men mamma spennir bara hendurnar niður í sínar grunnu lummar í kúdreingjabrókunum og snerkir. Nú fer babba at ganga miðleyst rundan um mamma. Hon er fjar og ønskriliga eymkandi. Men so trínur hann treystliga fram at henni aftur. Og hon gevur seg í føvningin á honum. Babba kínir henni varðliga. Men Samson ætlar okkurt:

– Hvat sigur tú, Anita?

– Ilt, gremur mamma seg og leggur seg tættari inn at babba. Hon vendir Samson bakið. Uttanfyri dregur hann á luftina. Ein likka, ið eins og eg er ov sein avstað, letur eins inniliga og ein illur alarmur.

Mamma heldur nú fast við báðum hondum um babba og grætur. *Dry your eyes. I never could bear to see you cry,* staðfestir Cher úr útvarpinum. Ein av lokkandi ljóðbitunum í tíðindaskránni er røddin á Edmun-